# Dagsskrá og fundarfrásøgn frá skúlastýrisfundi í skúlanum á Argjahamri

| Dagur: 29.jan.2030<br>Tíð:kl 18.00 – 20.30 | | Luttakarar: Allan, Jóhan, Bjørghild, Bergun og Marjun<br><br>Ikki møtt: | |
|---|---|---|---|
| **Dagsskrá** | | | **Miðlan** |
| 1. | Undirskriving av fundarfrásøgn | Skrivað undir skeiva fundarfrásøgn | AM |
| 2. | Mannagongdir til undirtøku: | Hesar vegleiðandi mannagongdir hava verið í námsfrøðiliga ráðnum.<br><br>a) Harðskapur mótvegis starvsfólkum.<br><br>b) Frávera hjá næmingum.<br><br>Prátið fall inn á Vitanetið sum nú er avskaffað og at Kervi nú er komið aftur. Hvøvuðsreglan í fráveruni er at foreldur stigvíst verða kunnaði so tað ikki kemur teimum dátt við at barn teirra hevur nógva fráveru | MH |
| 3 | Felags foreldrafundur, evni? | Digital happing er ein avbjóðing tí hvørki foreldur ella onnur vaksin hava atgongdina til henda heimin. Súsanna í Króki hevur gjørt kanning millum føroyskar skúlanæmingar.<br>Hon kundi verið eitt hugskot til eitt felags foreldrafund. Hon flytir heim tí føroya seint í vár, men kann halda fyrilestur yvir Skipe.<br>Maibritt Højgaardkundi kanska eisini verið eitt boð, hon hevur hildið skeið um m.a. relatiónir. Maibritt býr í Dk men er ofta heima í Føroyum.<br>Prátið fall annars aftur inn á fartelefonir. | MH |
| 4 | Mál frá seinasta fundi. | Fráboðaninar frá felags foreldrafundinum eru nakað ringar at fáa fatur í. Tá tað verður farið inn í málini er samanhangurin ein annar enn tann upprunaligi lýsti. Avbjóðingin er at oftast er søga aftan fyri á hinari ”síðuni” ikki er lýst, men bara tann eina síðan. Hetta kann til tíðir geva eina skeiklaða mynd av fyribrigdum og tilburðum. | MH |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 3. | Kunning | | Umvælingar<br>Nú hava vit fingið boð um at loysn er komin á trætuni viðvíkjandi skúlanum, soleiðis at arbeiði við umvælingum kann fara í gongd til várs.<br><br>Tað eru Articon við Eyðfinn Guttesen og Heidi Poulsen hjá Map arkitektum, ið saman við Petur Ritter skulu standa fyri at loysa uppgávuna.<br>Petur Ritter verður ráðgevi og skal hava eftirlit við arbeiðinum.<br><br>1) Takið skal skiftast í støðum har stórir lekar hava verið. Tað er tí partar av takinum sum skulu umvælast og hetta arbeiði byrjar í mai.<br>2) Høvuðsdyrnar skulu skiftast.<br>3) Vindeyguni sum liggja niðri við jørð og kondensa skulu skiftast<br>4) Klædningurin í frontinum av bygninginum skal skiftast<br>5) Gólvini sum er skædd av lekum skulu umvælast.<br><br>Partar av hesum eru tryggingarskaðar og annað fer kommunan at gjalda fyri.<br><br>Tíðindi frá næmingaráðnum.<br>Næmingarnir ynskja eitt skýli til sínar skutarar og hevur skúlin boða kommununi frá at møguleiki er at gera eitt skýlið á vestastu síðu upp ímóti betonggarðinum. Kommunan sigur gott fyri tí og skúlavørðanir skulu standa fyri arbeiðnum tá veðri gerst betur.<br>Næmingaráði ynskir at arbeiða við einari aðrari matarskipan, so at matur verður at fáa í kafeøkinum um middagstíð. Skúlin bakkar upp um hetta og tey arbeiða víðari við hesum máli.<br>Næmingaráðini arbeiða sjálvstøðugt, miðdeild og hádeild við hvør sínum stuðulslærara. | MH |
| 4. | Ymiskt | | Allan hevur verið á fundi fyri allar skúlastýrisformonnunum. Har bleiv m.a. umrøtt:<br>1) At venda aftur til ta gomlu innskrivingina<br>2) At skúlastýrisformenninir fingu eina betur samsýning fyri sín post<br>3)Tosað bleiv um trivnaðarætlaninar á skúlunum í kommununi<br>4) Kommunan hevði í hyggju at samla øll næmingaráð í býnum | AM |